Nr. 68/2019

Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi byggingini av bústovnum til fólk við serligum avbjóðingum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu støðan er viðvíkjandi bygging av bústovnum til fólk við serligum avbjóðingum í Suðurstreymoy og aðrastaðni í landinum?
2. Kunnu vit vænta seinkingar í verkætlanum, sum eru farnar í gongd?
3. Hvussu langt er byggingin/prosjekteringin av sambýlinum á Mýrini komin?
4. Nær kann væntast, at sjálv byggingin av hesum sambýli fer í gongd?

Viðmerkingar:
Fyrst Barnaheimið, so Kvíggjartún og nú møguliga eisini sambýlið á Mýrini.
Tá undirritaði á heysti 2019 í munnligum fyrispurningi spurdi um uppsteðgaðu verkætlanina av einum nýggjum barnaheimi, upplýsti landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, at hóast Barnheimið ikki bleiv bygt á hesum sinni, so fóru hinar verkætlanirnar í Suðurstreymoy at halda áfram ótarnaðar. Nú tá vit skriva apríl 2020, er framvegis onki hent, og búfólk og avvarðandi standa spyrjandi.
Long tíð er fráliðin og einans sæst útgrevstur á staðnum, har sambýlini á Mýrini stóðu.
Borgarar og avvarðandi mugu fáa greitt at vita, um tað er soleiðis, at verkætlanir draga út, og hvør orsøkin er til tess. Tørvurin á bústøðum til fólk við serligum avbjóðingum er akuttur, serliga í Suðurstreymoy, og tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 17. apríl. 2020

Djóni Nolsøe Joensen